

Grundgevingarnar fyri kvotuásetingini

→

roknast sum hampuliga reinur Atlantssjógvur. Í juni 1986 var hesin sjógvur at finna niður á stór dýpi langt norður úr Føroyum; men í februar 1995 var hann at kalla bara á sjálvum landgrunninum. Fyri ein part stendst hetta av árstíðini. Vanliga er meira av Atlantssjógvi í juni enn í februar; men alt bendir á, at ein jøvn minking av Atlantssjógvi hevur verið seinastu 5-10 árini norðan fyri Føroyar.



Mynd 8: *Saltnøgdin á einum skurði norður úr Føroyum (skurður b á Mynd 4) í juni 1986 og februar 1995. Sjógvur, sum var saltari enn 35,05 primillu, er skraveraður*



Mynd 9: *Vindur í Akrabyrgi mars-mai árini 1962-1994. Ovast til vinstru sæst, hvussu nógv prosent av vindmátingunum í mars-mai høvdu vindferðir yvir ávikavist 15 m/s og 20 m/s. Orkan, sum vindurin pumpar niður í sjógvin, verður vanliga mett proportional við triðja potens av vindferðini, og hetta er víst ovast til høgru. Tær niðastu báðar myndirnar vísa vindferðina í øðrum potensi roknaða (projiseraða) móti ávikavist eystri og norðri. Hesar báðar myndirnar lýsa kraftina, sum vindurin ger á hvønn kvadratmetur av vatnskorpu móti ávikavist eystri og norðri. Allar fýra myndirnar vísa miðaltøl fyri tíðarskeiðið mars-mei hvørt árið*

Vindur

Umframt viðurskiftini í sjónum sjálvum man vindur vera eitt av teimum fyribrigdum, sum tyðja mest fyri fisk og annað livandi í sjónum. Vindur ger røring og blanding í ovaru løgunum, har plantugróður er, og vindur flytir æti og fiskalarvur til og frá høskiligum umhvørvi. Vit hava áður mett, at ein orsøk til ringu toskaárgangirnar seint í 80-unum og fyrst í 90-unum kundi vera tann nógvi vindurin serliga av útsynningi í tí tíðarskeiðnum (mars-mai), tá rognkorn og larvur frá toskagýtingini reka fyri vág og vind. Men tað er ikki bara toskur, sum er serliga viðbrekin fyri vindi í hesum tíðarskeiði, og tað er tí av áhuga at fylgja broytingunum í vindi, serliga hesa tíðina av árinum.

Hjá Landsverkfrøðingunum er gjørt eitt stórt arbeiði at savna føroyskt veðurtilfar, bæði frá Meteorologisk Institut í Danmark og aðrastaðni, og við at nýta veðurmátingar úr Akrabergi, sum vit hava fingið haðani, hava vit roknað nøkur miðaltøl fyri vindin út, sí mynd 9. Myndin vísir trý ymisk fyribrigdi. Í Akrabyrgi eru mátingar gjørdar tríðja hvønn tíma, og ovasta vinstra tekningin á mynd 9 vísir, hvussu stórur prosentpartur av hesum mátingum í mars-mai tíðarskeiðnum hevði vindferð meira enn ávikavist 15 m/s og 20 m/s. Tað sæst á myndini, at seinastu 10-15 árini hevur verið nógv vanligari við nógvum vindi hesa tíðina av árinum, og tað tykist at liava hildið á, eisini í 1993 og 1994.

Somu gongdina siggja við á myndini ovast til høgru. Hon er fingin við at lyfta vindferðina við hvørja máting upp í tríðja potens og so rokna miðal út fyri allar mátingar í mars-mai hvørt árið. Burtur úr hesum fáa vit eitt mát fyri hvussu nógva orku vindurin pumpar niður í sjógvin.

Henda orka fer til aldur, streym, røring og blanding og kann vera avgerandi fyri gróðurin hjá plantuæti.

Tríðja mátið fyri vind á mynd 9 er vist á báðum teimum niðastu tekningunum. Har er vindferðin lyft upp til annan potens og so býtt upp (projicerað) eftir eystri og norðri, aðrenn miðal er funnið. Hetta átti at sagt nakað um kraftina frá vindinum á vatnskorpuna, og her hevur gongdin verið nakað øðrvísi. Í 1989-91 høvdu vit trý ár við nógvum og hørðum útsynningi, og vindurin hevði stóra kraft á sjógvin móti norðri og serliga móti eystri. Seinastu trý árini (1992-1994) hava vit enn havt lágætt, og vindurin hevur skumpað sjógvin meira móti norðri, enn vanligt var fyri 10-20 árum síðan; men kraftin móti eystri er nógv minkað, tó at hon enn er hampuliga stór.

Vit rokna við, at nógvur vindur og nógv blanding í sjónum er til bága fyri gróðurin, og eftir mynd 9 er støðan í so máta onki batnað. Eisini rokna vit við, at harðar útsynningur kann flyta rognkorn og larvur hjá t.d. toski út úr føroyskum øki, og tað tykist hava verið frægari seinastu trý árini. Vit vita tó alt ov lítið um viðurskiftini í havinum, til at kunna gera nakrar heildarniðurstøður, og eisini eiga tølini sjálv at takast við ávísum fyrivarni, tí nógv er, sum kann gera vindmátingar óálitandi.

Samandráttur

Sum heild kunnu vit siga, at sjógvurin, bæði á Landgrunninum og úti á opnum havi hevur verið kaldur seinastu árini. Helst er hetta tekin um, at Norðuratlantsstreymurin hevur verið veikur í mun til Eysturlandsstreymin. Í september 1994 fór hitin á Landgrunninum upp um miðal; men úti á opnum havi tykist Atlantssjógvurin at minka í útbreiðslu samanborið við sjógv frá Eysturlendska streyminum. Vindurin um várið tykist enn at vera høgur; men útsynningurin hesa tíðina tykist ikki so sterkur sum fyri einum fimm árum síðan.

tónleikaummæli

Heini Lütz en føroyameistari í at syngja klárt og týðiliga



Nakað undan ólavsøku gav Heini Lützen út bæði fløgu og band – »Tíðirnar skifta« – við ellivu sangum.

At dentur verður lagdur á at røkka ta tilkomnu fjøldina, er einki at ivast í, tí her er talan fyrst og fremst um klassikarar innan kristnan sang, ið tey flestu annaðhvørt hava hoyrt ella sungið sjálvi. Umframt alt hetta kenda, er so eisini okkurt nýtt við, so sum titullagið »Tíðirnar skifta«.

Hetta lagið tykist longu01/08/1995hava vunnið sær fast pláss í kvøðuljómunum og í øðrum tónleikasendingum, men allarhelst í harðari kapping við sálmin »Jesus, hitt einasta«, ið tú kundi hoyra annaðhvørt menniskja murra ella syngja í havnargøtum á ólavsøku…

Tónleikurin á útgávuni er væl úr hondum greiddur – bæði tann innflutti úr Íslandi, ið verður brúktur til átta av ið verður spældur av Heina sjálvum og Jón Svein Heinesen, Dániali og Jákupi Zachariassen.

At Heini við hesi útgávuni hevur rakt plett á so mangan hátt, ber ikki bert undirtøkan á ólavsøku boð um. Einki er at ivast í, at tann klára og reina røddin saman við góðum bakgrundssangi vinnur nógvastaðni – ikki minst í eini tíð, har meginparturin av tí, ið verður útgivið, heldur er ein greytur av ljóði, enn nakað, tú kanst lurta eftir og skilja nakað av. Stutt sagt: Høvdu vit í Føroyum havt eina kapping um føroyameistaraskapin í klárum og týðiligum sangi, kenni eg ongan, ið av álvara kundi bjóða Lützen-manninum av. Hvørt einasta orð fært tú við – og tað er nakað, mong eru glað fyri!

Tíl vildar øllum kann eingin gera, og so er kortini eisini her. Tað er irriterandi at fáa eitt fløguumslag upp í hondina, ið er fult av stavivillum. Tá nógv tíð og orka frammanundan verður løgd í eina slíka framleiðslu, hevði tað einki bilað, um hesin partur in vard eins væl úr hondum greiddur og alt hitt.

Kortini skalar tað ikki tónlistarligu dygdina, ið á hesi útgávuni er í toppi!

Hilmar Jan Hansen